



*Túsund dekoratiónir verða handaðar um skivuna í desember.*
*– Men stuttligast er at avgreiða bíleggingar til reseptiónir, tí tær skulu allar vera ymiskar. So tá sleppa vit veruliga at royna okkum, sigur Brynhild*

handlar, men tá var ikki vanligt at senda pengar til ávís endamál í sambandi við jarðarferðir.

- Tað var tann reini ørskapur, tí hvørt mansbarn sendi blómur ella krans, sigur Brynhild, sum heldur tað vera sera positivt, at fólk senda pening til vælgerandi endamál.

- Vit hava úr at gera, og ongin fer í grøvina uttan blómur. Tey nærmastu keypa altíð, og peningurin kemur teimum livandi til góðar og hjálpa nógvum felagsskapum.

## Vit eru serfrøðingar

Spurd, um eitthvørt er, sum tey seta eina serliga æru í, greiðir Brynhild frá, at í sambandi við jarðarferðir hevur tað stóran týdning, at tey avvarðandi kunnu líta á, at tey ikki nýtast at hugsa meira um blómurnar, tá ið tey hava bílagt tær.

- Vit fortelja teimum, at vit taka okkum av øllum, bæði kapellið, at leggja blómurnar pent á kistuna og at pynta upp í kirkjuni. Hetta hevur stóran týdning, tí tey hava als ikki yvirskot til at taka sær av blómum og kransum, sum bara verða løgd inn á gólvið heima ella í kirkjuni. Vit eru serfrøðingar á økinum, og gera hetta hvørja ferð, eisini jólaaftan, um tað skuldi verið, sigur Brynhild.

## Detta av jólaaftan

Sum sagt er tíðin í drekahúsinum farin at halla. Brynhild ætlar at selja handilin og koma víðari.

- Onki menniskja trýr, hvussu strævið tað er at vera blómuhandlari, sigur hon. Og yngri starvsfelagin, Elin, tekur undir við henni, meðan hon hampar nakrar plantur, sum komu við Norrønu í morgun, tríggjar dagar ov seint.

- Tað egnar seg í øllum førum ikki til eitt vanligt familjulív, skoytir hon uppí, og tær vísa til gravarferðir fyrsta jóladag og langa fríggjadag.

- Jólini liggja vit fullstendiga avdotnar undir jólatrænum, siga tær at enda og flenna hjartaliga.

*Skrivað hevur: Rigmor Dam*
*Myndir: Sunva Eysturoy Lassen*